

## Andrew í apríl-søgu

Tað var eingin álvari handan orðini, tá Portalurin sunnumorgunin staðfesti, at Todi Jónsson hevur noktað Andrew av Fløtum at spæla við føroyska landsliðnum. Talan var um eina apríl-søgu, og sum skilst, so hava tað verið onkrir lesarar, sum vorðu fangaðir á skeiva beininum.
Todi Jónsson letur tó heilsa úr Fremad Amager og sigur, at tey sjálvandi einki hava ímóti at Andrew er partur av føroysku landsliðnum. Og sjálvur gleðir Andrew seg eisini til komandi avbjóðingarnar, har Italia og Skotland standa fremst í røðini.

## Páll setti enn eitt met

Úrslitini hjá føroysku HM-svimjarunum í Melbourne hava verið avbera góð, og áðrenn Pál Joensen fór í hylin sunnunáttina at luttaka í kappingini á 1500 m frí teininum, høvdu føroyingarnir sett heili fimm nýggj met.
Sterkasta greinin hjá Pál er 1500 metrar frísvimjing, og hann setti eisini nýtt met við tíðini 16.23,56. Gamla metið átti hann sjálvur. Hetta gjørdist sostatt triðja metið, sum Pál setti í HM-kappingini, og føroysku svimjararnir hava tilsamans sett seks nýggj met á túrinum.

VÍF-Kyndil 29-31 (16-15):

# Kyndil fór avstað við




**Alt týddi uppá ein sigur til VÍF síðstu løtuna av næsta finaludystinum í manshondbólti. Teir førdu við trimum málum, tá fimm minuttir vóru eftir, men síðstu løtuna raknaði Kyndil við. Teir vunnu við tveimum málum, og sostatt fekk Kyndil sítt 30. meistaraheitið í søguni hjá felagnum**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Lagt var upp til eitt satt brak í Vestmanna leygardagin, tá ið næsti finaludysturin í manshondbólti var á skránni. Her tók VÍF ímóti Kyndli, og fyrri dysturin, sum var í høllini á Hálsi seks dagar frammanundan, var endaður við einum rættiliga trivalisum sigri til Kyndil.

Tí var málsetningurin púra greiður hjá vestmenningum undan dystinum leygardagin. Teir skuldu vinna, um teir skuldu hava nakran møguleika at vinna meistaraheitið. Kyndil hevði hinvegin nokk við einum javnleiki, tí so blivu teir meistarar.

Fyrri finaludysturin í høllini á Hálsi bleiv eisini sera dramatiskur á tann hátt, at tveir VÍF-leikarar blivu riknir av vølli. Bæði Agnar Joensen og John Zachariassen fingu beinleiðis reytt kort, og tí vóru teir báðir sjálvsagt ikki við í seinna dystinum í Vestmanna.

### VÍF legði bragdliga fyri

Sjálvt um VÍF manglaði tveir av sínum stuðulsleikarum í Agnar og John, so sá tó ikki so galið út. Eli Müller var aftur í málinum, og Ingi Olsen, sum ikki var við í fyrra dystinum í Havn vegna skaða, var blivin klárur aftur. Harafturat hevði VÍF grivið tveir sannar jokarar upp til dystin. Johnny Joensen, sum hevur spælt við triðja liðnum hjá VÍF, stóð á dómaraseðlinum, og tað sama gjørdi rumenin, Piti Negru, sum spældi við